Bræv frá bin Laden

Eitt arabiskt blað prentaði sunnudagin eitt bræv, sum sambært blaðnum var frá yvirgangsmanninum Osama bin Laden.

Blaðið skrivaði, at ein av tess blaðmonnum hevði fingið brævið umvegis ein granskingarstovn í Pakistan. Brævið, sum var heilar 26 síður langt, var skrivað á arabiskum. Dagfesting var eingin, men keldur í London hava upplýst fyri blaðnum, at tað er skrivað fyri umleið 14 døgum síðani.

Í brævinum verður millum annað spurt, nær muslimarnir fara at vakna upp úr svøvni, nær teir fara at skilja ímillum vin og fíggindar, og nær teir fara at venda ørvum sínum ímóti tí fíggindanum, sum rænir teirra ríkidømi og tilfeingi. Er tað veruliga bin Laden, sum hevur skrivað brævið, er tað fyrstu ferð, at hann hevur latið nakað lívstekin frá sær í hesum árinum.

Drápsmál kann byrja

Belgiumaðurin Marc Dutroux, sum er ákærdur fyri at hava burturflutt, neyðtikið og myrt fýra ungar gentur, kemur væntandi fyri rættin eina ferð seinni í ár.

Dutroux hevur sitið í varðhaldi, síðani hann varð tikin í 1996. Málið elvdi til øgvusliga øsing í Belgia, og síðani hevur løgreglan staðið fyri skotum, tí mong halda, at tað hevur tikið alt ov drúgva tíð at kanna málið. Sjálvur sigur Marc Dutroux seg vera ósekan.

Belgiska løgreglan sigur, at kona Dutroux verður eisini ákærd. Tað sama er galdandi fyri ein annan mann, meðan ein triði, sum varð tikin og skuldsettur fyri at hava verið uppií, sleppur undan ákæru. Tað vilja avvarandi hjá teimum fýra gentunum ikki góðtaka, og tey hava sett fram krav um, at tann triði maðurin eisini verður ákærdur og drigin fyri rættin.

Ikki í ár

Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, gjørdi í gjár greitt, at bretar skulu ikki á fólkaatkvøðu um evruna í ár.

Fyrr hevur Blair sagt, at fimm treytir skulu verða uppfyltar, áðrenn fólkaatkvøða verður um at seta evruna í gildi í staðin fyri pundið, men við blaðið The Independent sigur hann, at fólkaatkvøðan verður ikki í ár, sjálvt um tær fimm treytirnar verða uppfyltar. Sambært forsætisráðharranum er tað Irak-kreppan, sum ger, at politikkararnir hava ikki stundir til at tosa um evruna nú.

Samstundis hevur blaðið Financial Times kunngjørt eina meiningakanning, sum vísir, at flestu virkisleiðararnir í Bretlandi eru ímóti at seta evruna í gildi í staðin fyri pundið. Í einari tilsvarandi kanning fyri fimm árum síðani tóku tær flestu virkisleiðararnir undir við hugskotinum um eitt felags evropeiskt gjaldoyra.

Røkke royndi at fáa blaðkvinnu at tiga

Tá norska blaðkvinnan Åsne Seierstad fyri nøkrum árum síðani skrivaði nakrar atfinningarsamar greinar um ríkmannin og stórreiðaran Kjell Inge Røkke, royndi Røkke at fáa hana at taka av einum tilboði um at arbeiða hjá sær. Tað skrivar norska blaðið Finansavisen.

Greinarnar hjá Åssne Seierstad snúðu seg um tann risastóra troleran "American Monarch". Trolarin kostaði 470 milliónir krónur, og Røkke royndi at útvega honum fiskiloyvi í Russlandi, eftir at myndugleikarnir í Kili høvdu sýtt skipinum at fiska har. Åssne Seierstad, sum hevði gott samband við russar, sáddi iva um ætlanina hjá Røkke at útvega skipinum russiskt fiskiloyvi.

Fyri at fáa blaðkvinnuna at gevast við at skriva um málið royndi Kjell Inge Røkke at fáa hana at arbeiða hjá sær, skrivar Finansavisen. Fyrrverandi blaðstjórin hjá blaðkvinnuni, Steinar Hansson, váttar tíðindini.

UTTAN ÚR HEIMI

Mótmæltu krígsætlan

Bæði í USA og í Evropa gingu túsundtals fólk mótmælisgongu um vikuskiftið ímóti hóttanini um kríggj við Irak

IRAK-KREPPAN
Árni Joensen



Fleiri túsund fólk mótmæltu um vikuskiftið ætlanini um kríggj við Irak. Hendan myndin er av mótmælisfólki í Pennsylvania í USA
Mynd: Reuters

"Bush drápsmaður", "Nei til kríggj" og annað stóð at lesa á skeltum, sum fleiri túsund mótmælisfólk høvdu við sær, tá tey gingu í gøtunum í fleiri stórbýum í Bretlandi, Belgia, Spania, Turkalandi og USA um vikuskiftið.

Uttan fyri høvuðsstøðina hjá bretsku herleiðsluni komu nógv fólk saman at mótmæla krígsætlanini. Tá nøkur av mótmælisfólkunum royndu at leinkja seg til girðingina kring høvuðsstøðina, legði løgreglan uppí, og umleið 50 mótmælisfólk vórðu tikin.

Sunnunáttina vóru fleiri mótmælisgongur í amerikanskum býum, har fólk mótmæltu ætlanini hjá stjórnini at leypa á Irak.

Suðurafrikanari myrdi Palme

Ein maður úr Suðurafrika, sum hevði samband við gamla stýrið har, verður nú nevndur sum maðurin, ið myrdi svenska forsætisráðharran Olof Palme í 1986

PALME-MORÐIÐ
Árni Joensen

Maðurin, sum nú verður hildin at vera drápsmaðurin, er ongantíð fyrr drigin upp í tað loyndarfulla morðið. Men í gjár skrivaði Dagens Nyheter, at tað er skjalprógvað, at maðurin var í Stockholm tann 28. februar í 1986, tá Olof Palme varð myrdur.

Upplýsingarnar eru frá handilsmanninum Kent Ajland, sum hevur arbeitt saman við suðurafrikanarum í einari roynd at finna drápsmannin. Sjálvur sigur Kent Ajland, at hann fekk upplýsingar um mannin, tá hann einaferð var á handilsferð í Suðurafrika.

Maðurin, sum sambært Kent Ajland myrdi Palme, býr í dag í einum øðrum landi, og hann varð ikki drigin upp í kanningarnar, tá svensku myndugleikarnir fyri sjey árum síðani kannaðu, at Suðurafrika hevði nakað við Palme-morðið at gera. Hinvegin var tað ikki nakað loyndarmál, at táverandi suðurafrikansku myndugleikarnir mettu Palme sum ein av sínum fíggindum, tí hann hevði gott samband við ta svørtu frælsisrørsluna ANC.

Kent Ajland hevur kunnað svensku løgregluna um tað, sum hann er komin til, og løgreglumaðurin, sum stendur á odda fyri morðkanningunum, hevur verið í Suðurafrika og tosað við mannin, sum greiddi svenska handilsmanninum frá, hvør drápsmaðurin er. Svenski løgregluovastin, Lars Nyhlen, sigur, at løgreglan fær nógvar upplýsingar um Palme-morðið, men hann viðgongur, at tann seinasta upplýsingin er serliga áhugaverd.

Pressufrælsið má víkja í krígstíð

Flestu amerikanarar halda, at fjølmiðlarnir eiga ikki at vera atfinningarsamir í krígstíð, men at tað vanliga pressufrælsið eigur at víkja

56 prosent av teimum, sum fingu spurningin í einari kanning hjá sjónvarpinum ABC, svaraðu, at teir amerikansku fjølmiðlarnir eiga at taka undir við stjórnini í krígstíð, meðan 36 prosent halda, at tíðindafólkini skulu seta politikarunum nærgangandi og atfinningarsamar spurningar.

Hinvegin halda 90 prosent av amerikanarunum, at í friðartíð er tað sera umráðandi, at fjølmiðlarnir hava frælsi at arbeiða, og at tá er tað uppgávan hjá fjølmiðlunum at vera atfinningarsamir, tá talan er um politikkin hjá stjórnini.

Ein frágreiðing hjá Information Security Oversight Office vísir annars, at frælsið hjá amerikansku fjølmiðlunum er skert munandi síðani tann 11. september í 2001. Sambært frágreiðingini vórðu 33 milliónir skjøl hjá amerikansku stjórnarumsitingini stemplað sum loynilig í 2001, og tað var næstan helvtina meiri enn árið fyri.

Jack Nelson, sum hevur skrivað eina frágreiðing um tey nógvu loyniligu skjølini hjá Bush-stjórnini, segði við blaðið Los Angeles Times fyri nøkrum døgum síðani, at tann broytti politikkurin gjørdi seg galdandi longu undan atsóknunum í New York og Washington. Hann vil vera við, at heldur ikki teir fólkavaldu politikararnir hava atgongd til nógv av skjølunum.

- Samstundis hevur stjórnarumsitingin lagt seg eftir at lata ymiskt, sum tænir hennara politisku málum, leka út, sigur Jack Nelson. Hann vísir millum annað á tær nógvu upplýsingarnar um fyrireikingarnar til eitt kríggj við Irak og royndina at sannføra fólk um, at tað er neyðugt at fara í hernað ímóti altjóða yvirgangi. Her hevur umsitingin latið nógvar upplýsingar, sum tæna hennara máli, leka út til almenningin, sigur Jack Nelson.

ítróttur

Nr. 13 • týsdagur • 21. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Skála fær jugoslaviskan styrk

Komandi kappingarár koma tríggir jugoslaviskir leikarar at styrkja um hópin hjá Skála, sum nú eisini telir rumenska Iulian Florescu

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Uttan at taka munnin ov fullan ber helst til at staðfesta, at fyrsta árið hjá Skála í bestu fótbóltsdeildini var sera væl eydnað. Eftir at liðið fyrstu nógvu umførini var á niðasta plássinum, gjørdu teir ein ordans vørr seinastu umførini, soleiðis at teir ikki bara vunnið seg av botninum, men eisini somikið langt, at tað gjørdist EB/Streymur, sum mátti spæla um upp- og niðurflyting.

Nógv frágongd

Hetta hevur tó ikki fingið teir í Skála at halda, at nú stendur alt væl til. Frágongdin av fólki hevur nakað stór, og tá hópurin teimum størstu, hevur leiðslan kannað eftir, hvussu hópurin kann styrkjast.

Av leikarum frá í fjør, sum ikki longur eru í felagnum kunnu nevnast teir báðir útlendingarnir, Gheorghe Callo og Alexandru Gabor, Dánjal Nielsen, Kári Nielsen, Áki Petersen og Rúni Rasmussen, og hartil tykist tað í løtuni vera sera ivasamt, hvørt Pauli Poulsen verður aftur at síggja á liðnum. Í øllum førum sum leikari.

Full kvota

Í royndunum at finna nýggjar leikarar hevur felagið havt samband við fyrrverandi VB-venjaran, Darko Kovasevic, og saman við Jóhan Nielsen er hesin nú komin fram til tríggjar leikarar, sum skulu styrkja um liðið. Og tað er greitt, at tað fyrst og fremst hevur verið verjuparturin, sum teir báðir hava hugsað um.

Talan er nevnliga um tveir miðverjuleikarar og ein verjukendan miðvallara, sum koma til landið úr Jugoslavia. Miðvallarin hevur undan hesum leikt við FK Obilic, sum fyri tveimum árum síðani spældi ímóti GÍ. Teir báðir miðverjarnir hava báðir leikt við felagi í næstbestu jugoslavisku deildini, og verða báðir lýstir sum kropsliga sterkir verjuleikarar, sum tó eisini hava teknikkin í lagi. Enn eru øll viðurskiftini við nýggju leikarunum ikki endaliga komin í rættlag, men væntandi verða seinastu pappírini avgreidd í komandi vikuni, soleiðis at nýggju mennirnir sum skjótast kunnu sleppa at venja saman við nýggju liðfeløgunum.

Umframt hesar tríggjar jugoslavarnar, hevur Skála framvegis rumenska Eugen Voda í málinum, soleiðis at útlendingakvotan hjá felagnum er nýtt til fulnar. Hartil hevur felagið í vetur eisini fingið tilgongd av rumenska Iulian Florescu, sum áður hevur leikt við B71 og B36. Iulian hevur verið somikið leingi í Føroyum, at hann ikki telur sum útlendingur í fótbóltshøpi. Og endaliga er avtala eisini gjørd við Sonna L. Petersen.

Til komandi kappingarár hevur Skála tryggjað sær tilgongd av trimum jugoslaviskum leikarum, umframt at Iulian Florescu eisini verður við liðnum. Frammanundan hevur felagið eisini rumenska Eugen Voda í málinum

Óli Johannesen fer til Skotlands

Óli Johannesen skuldi mánadagin til Skotlands, har hann ætlandi fer at royndarvenja við einum ella fleiri skotskum feløgum

Væl vitandi keldur í Skotlandi vilja vera við, at føroyski landsliðsskiparin skal venja við Aberdeen komandi vikuna

YRKISFÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Seinastu tíðina hevur millum lítið og einki verið at hoyrt til, hvar framtíðin hjá liðformanninum á føroyska A-landsliðnum í fótbólti skal liggja.

Eftir at tað í fjør gjørdist greitt, at framtíð hansara undir ongum umstøðum skuldi vera í Hvidovre. Tá danska kappingin var av, gekk leiðin í staðin til TB, sum hóast hendan styrkin flutti niður eftir bert eitt ár í bestu fótbóltsdeildini á hesum sinni.

Síðani hetta hevur tað verið rættiliga lítið at hoyra. Onkrar søgur hava verið frammi um, at hann skuldi gerast leikandi venjari hjá TB, meðan aðrar settu hann í samband við HB, men sambært keldum okkara er tó ikki aktuelt við nøkrum av hesum.

Ístaðin fer Óli Johannesen nú til Skotlands, har hann ætlandi skal royna seg komandi dagarnar. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa fatur á Óla Johannsen, men væl vitandi keldur hjá Sosialinum siga, at Óli fer til Skotlands mánadagin, har hann so skal til royndarvenjingar hjá einum ella fleiri feløgum.

Einasta, sum tykist heilt víst í hesum er, at Aberdeen er eitt av feløgunum, sum skal hava sýnt Óla Johannesen áhuga. Steve Paterson tók har við í venjarasessinum í heyst, eftir at danski Ebbe Skovdahl varð koyrdur frá. Og einki er at ivast í, at hann leitar sær eftir nýggjum leikarum, nú sokallaða transfer-vindeygað er opið. Hetta hevur eisini verið nevnt í skotskum miðlum, sum helst enn ikki hava gloymt, hvussu tað gekst, tá Føroyar og Skotand tókust í fjør.

Enn er tó ikki víst, at talan verður um nakran sáttmála hjá Óla, men meira verður at frætta um hetta í næstum.